# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur hósdagin 15. mai**
***Sambýlið á Heygnum:*** kl. 19.30, Elsa funding

**Christianskirkjan**
Matiné leygardagin 17. mai 2008 kl. 11 við duoini Lunde og Krebs.

**trinitatis sunnudag**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Hanus Simonsen, familjuguðstænasta. Kórið dropar luttekur við sangi
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Bjarni Bæk
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Ann D. Hansen
***Vestmanna:*** kl. 11, Inga Poulsen Dam
***Kvívík:*** kl. 12, Theodor E. D. Olsen
***Sørvágur:*** kl. 11 altargongd David Johannesen
***Norðskáli:*** kl. 11 messa Sverri Steinhólm og Emil Olsen
***Gøta:*** kl. 11 (við offurgongd) Jógvan Fríðriksson, biskupur og Martin R. Jacobsen
***- lagt verður fyri við morgundrekka kl. 9.30.***
***Oyndarfjørður:*** kl. 11 Guðstænasta við altargangi, v/ Henning Bøgesvang
***Mikladalur:*** kl. 12, altargangur. Magnus Brahé Jørgensen.
***Svínoy:*** kl. 12, Elsa Funding
***Hvalba:*** kl. 12.30 Simun Jacobsen
***Tvøroyri:*** kl. 11 Símun Jacobsen
***Leiti:*** kl. 12, Patrick de Neergaard

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17.00 Bøn fyri Býnum og Ísrael
kl. 18 Delli (3. til 6. fl.)
kl. 20 Chill (7. til 10. fl.)
Leygardagin kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgunmøti - Anna Guttesen talar, Barnagudstænasta kl. 11.30
www.filadelfia.fo

**Lívdin**
**Á Brekku 3**
Hóskvøldið kl. 20 kjakfundur, evni »Trúgv og vísindi«
***Í Hoyvíkar skúla***
fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti evni er »Útbreiðsla av evangeliinum«.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Tilbiðjunarmøti, Símun Absalonsen talar
Kl 12 Sunnudagsskúli
Undir báðum møtinum verður barnaansing.
Møtini eru at hoyra beinleiðis á www.livdin.fo
***Á Brekku*** týskvøldið kl. 20 skeiðvirksemi – »Grundlæra og royndir í Missión«.
Øll eru vælkomin.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagur kl. 20 Bíbliutími.
Fríggjakvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Sunnudagsskúli.
Sunnudagur kl. 19 Møti við Elsu Østergaard, Hoyvík. Argjakórið syngur.
www.koma.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta.**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, tema: Skapanarverkið.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti. http://www.gospel.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Hósdag kl. 19 Síðsta Heimaforbund áðrenn feriuna verður Í Lágni nr. 18.
Sunnudag kl. 11 og kl. 18 møtir har vit varpa ljós á »Guds skaparverk, mín ábyrgd«.
Sunnudagsskúli kl. 14.
(Mint verður á LOPPUMARKNAÐ í Kagganum, Dalav., leygardag 24.5., lutir móttakast við tøkk tlf. 514189.)
www.frelsunarherurin.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin 16. til sunnudagin 18. mai Ten-sing lega í Klaksvík.
Mánadagin 19. mai kl. 15 í KFUK: Seinnapartssamkoman við Tummasi Lauritsen úr Miðvági. Evni: Umhvørvisábyrgd sum kristin.
Týsdagin 20. mai kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børnm.

**Ebenezer**
Hósdag kl. 17.00: Sangvenjing – Barnakórið – Gentir og dreingir 7-9 ár
kl. 20.00 Ungdómsmøti – Talari: Kristian Hansen – Evni: Tey tíggju boðini.
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Leygardagur kl. 14 Brúðarvígsla – Judith Schwartson og Mortan Johannesen.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti
Mánadag kl. 12.30 Andakt.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Atla Rasmussen.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Kedron, Sørvágur**
Leygardagin kl. 15 Hugnaløta fyri eldri.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 11.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Týsdagin 20. mai kl. 20. Bíbliutími fyri ung.
Mikudagin 21. mai kl. 20. Bønarmøti.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Hósdagin 20/05 á møtinum luttaka Leif og Susanne Madsen frá Nakuru, Kenya - klokkan 20
Sunnudagin 18/05 morgunmøti við breyðbróting klokkan 11
Veri hjartaliga vælkomin.
sí www.saron.fo

**Vestmanna Missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 20 hevur Útimøtibólkurin útimøti á Torginum, aftaná er drekka og sangløta í missiónshúsinum.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bønarløta verður hóskvøldið kl. 19.30
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.00 og møti kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Ingibjørn Royðutoft.
Sunnudagin kl. 17, Møti við Arna Abrahamsen. Sangur við Ecclesia.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Rituvík**
Leygardagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ stýrinum.
Sunnudagin kl. 20 Møti v/ Hera Trøndheim. Evni: Einglar. Kórið í Rituvík syngur (barnaansing).
Týsdagin kl. 20 Bønarmøti.

**Eydnan á Oyrarbakka**
**Møti í Eydnuni á Oyrarbakka.**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Jan Joensen og Palli Højgård tala, Jonna Højgård og fleiri syngja. Øll eru vælkomin til møti. Vit minna á útifundin í Vestmanna leygarkvøldið kl. 20.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Hósdagur kl. 20 Bønarløta.
Fríggjadagur kl. 21 Ungdómsmøti - Glyvrapraise.
Sunnudagur kl. 17 Familjumøti. Drekka aftaná.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 18 mai verður farið niðan á Fjallið, Hvalvík. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10. Túrurin er løttur til miðal tungur, og gingið verður uml. 3 tímar. Minst til at hava góð og heit gonguklæði og matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni ella tlf. 302425.

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Gongutúrur verður niðan á Sneis (Streymoy) sunnudagin 18. mai. Vit møtast við SHELLstøðina í Vestmanna klokkan 14.

# HEILSANIR





**Góða fitta Maja**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskja omma og Daniel gubbi**

**Góðu Alexandra og Silas**
Hjartaliga tillukku við 3 og 4 ára døgunum 13 og 23 maj. Vit elska tykkum.
**Heilsan omma, abbi og langomma**



**Góða elskaða dóttir**
Tillukku við teimum 20.
**Babba**

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin 28. mai verða tvíburðarnir Kristoffur Matras, Norðoyri og Julianna Matras á Hálvmørk, Toftir, 60 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum í Klaksvík fríggjadagin 30. mai kl. 19. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 456570 ella 287578 í seinasta lagi tann 18. mai.

Týsdagin 10. juni verða tvíburðarnir Ruth Thomassen, Tórshavn, og Agnar Petersen, Argir, ættað úr Kaldbak, 60 ár. Føðingardagin halda tey saman í Pálsstovu fríggjadagin 13. juni kl. 19.00. Tey, sum ynskja at halda dagin saman við okkum vera vinarligast biðin um at siga frá í seinasta lagi 1. juni hjá Ruth tlf. 314309 ella Agnar tlf. 318460.

**90 ára føðingardagur**
16. mai verður Petur Højgaard í Saltangará 90 ár. Móttøka verður í Sjókafe'ini kl. 18-22.

**Konfirmatión í Danmark**
Sunnudagin tann 18. mai verður Andrias Høgnason Eriksen, sonur Randi Restorff Jacobsen og Høgna Eriksen fermdur í Sct. Jacobi kirkju. Bústaður: Navervej 7, 6800 Varde, Danmark.

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 18. juni hava Ann og Sámal Christiansen í Hósvík silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygarkvøldið 21. juni kl. 19.30 í bygdarhúsinum í Hósvík. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 12. juni á tlf. 422368 heima, 214820 Ann, 215687 Sámal ella á meyli ann@sosialurin.fo ella samal@samteld.fo

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 21. juni hava Ása og Petur Midjord, Fuglafjørður gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík sama dag kl. 18.00. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, vera biðin um at siga frá áðrenn 12. juni á tlf. 444121.

Sunnudagin 18. mai hava Kathrina og Símun Lamhauge gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Brúdleyp**
Leygardagin 17. mai kl. 14:00 giftast í Betesda, Klaksvík, Fríða Jákupsdóttir, Tórshavn og Martin Sivertsen, Klaksvík. Drekkamuður verður í Betesda aftaná vígsluna. Veitsla verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Leygardagin 17. mai giftast Judith Schwartson og Mortan Johannesen úr Havn. Brúðarvígslan verður í Ebenezer kl. 14. Veitsla verður fyri innbodnum í Oasuni í Hoyvík kl. 19.



Leygardagin 17. mai giftast í Catholic Parish, Sibalom Antique, Sigmund Bech, Porkeri og Rowena Jungco Nupital. Br.adr.: Violeta Jungco c/o Cosenjo Orbino, Terjares Subdivision, San Angel, San Jose Antique, Philippins. mail: sigmund.bech@hotmail.com

Leygardagin 7. juni kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Linda Jensen og Allan við Rætt, Toftir. Døgurði verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 28. mai á tlf. 223578, 448356 ella 447881.

Leygardagin 12. juli kl. 15.00 giftast í Uggerslev kirke, Karina Abelsen og Jan Eidesgaard, Eiði. Veitslan verður hildin í Uggerslev Forsamlingshus. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 16. mai á tlf. 004541622098 – 004564825820 ella via mail: janhoghamar@gmail.com

Leygardagin 12. juli giftast í Vágs kirkju Sunnvá Mortensen Hovi og Magni Fróði Magnussen Vági. Veitsla verður í Samkomuhúsinum í Sumba kl. 19. Tey í vilja gleða okkum við at koma vera vinarliga biðin um at siga frá innan 10. juni á tlf: 373698 (Hovi), 373194 (Vági) ella 0045 29261369 (Sunnvá).

Leygardagin 17. mai kl. 15 giftast í Vesturkirkjuni Alvilda Brøðraberg og Jógvan Lützen. Veitslan verður í fyri innboðin HB-húsinum kl. 19.

